# Hvør fær bóltarnar?



**Sosialurin fer at løna liðunum í Formuladeildini fyri at spæla undirhaldandi fótbólt. Aftan á hvønn dyst verða liðini vigað og mett, og tá ið kappingarárið er av, verður mest undirhaldandi liðið kosið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hvat kemur fyrst, úrslitini ella undirhald?

Spyrt tú teir 10 venjararnar í Formuladeildini, ivast teir neyvan í at siga, at úrslitið hevur størri týdning enn undirhaldandi fótbóltsspæl. Og tað munnu flestu spælararnir eisini halda – teir vilja heldur vinna enn undirhalda áskoðararnar.

Men kanska ber tað til at fáa nakað av báðum, og helst er tað júst hetta, sum bæði venjarar og spælarar miðja eftir. Samstundis sum teir vilja hava síni lið at vinna dystir, vóna teir eisini, at liðið kann spæla væl.

Sosialurin heldur í øllum førum, at undirhaldið í fótbóltsspælinum hevur stóran týdning, og tí ætlar blaðið sær undir ein nýggjan tátt, at tey væl spælandi liðini verða lønt fyri síni avrik.

## Vinnarin fær 20 bóltar

Eftir hvønn dyst í Formuladeildini lata vit liðunum stig eftir eini skipan, har ein bóltur er tað minsta, og seks bóltar eru tað mesta.

Tá stigini verða latin, hevur úrslitið mini týdning enn spælið hjá liðnum, og tí kann tað saktans koma fyri, at eitt lið, sum hevur tapt ein dyst, fær fleiri bóltar enn mótstøðuliðið, um tað hevur spælt góðan fótbólt.

Og hvat er so góður fótbóltur? Ja, fleiri hugsanir eru um tað, men vit fara løna liðum, har áskoðararnir fáa nakað fyri pengarnar – um tað so er polerað kombinatiónsspæl, málsøkjandi álopsspæl ella framúr einstaklingaavrik.

Gjøgnum kappingarárið verða stigini hjá teimum ymsu feløgunum tald saman, og eftir kappingina verður vinnarin funnin.

Vinnandi felagið fær 20 spildurnýggjar Pumabóltar frá Thomas Dam Ítrótti, og hesir bóltar eru ætlaðir felagnum at lata sum persónlig gáva til ungdómsspælarar, sum hava uppiborið eitt herðaklapp. Tað kann verða eitt smápiltalið, sum hevur verið áhaldandi ígjøgnum eitt ár, ella eitt gentulið, sum hevur spælt væl.


# FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*

ATLANTIC AIRWAYS






***Hvar er bólturin?***

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.